# Sólgrátur
## Uppskot til uppgávur




**Sólgrátur**

**Ingun Christensen**

Bókadeild Føroya Lærarafelags, 2021

Asta Wolles, Eilen Anthoniussen, Emmy Joensen
og Gunvá Magnussen
Nám 2022

## Áðrenn tit lesa

- Hyggið at permumyndini og lesið baksíðutekstin og tekstin í klaffunum.
- Tosið saman um, hvat bókin man fara at snúgva seg um.
- Hvat vita tit um rithøvundin?

## Meðan tit lesa

- Hav ein blýant og pappír við hondina og skriva niður tað, sum tú metir vera áhugavert at tosa við hini í flokkinum um.
- Emojiuppgáva: Nýt emojis á telefonini til at lýsa hvønn kapittul. (Nýt t.d. appina til notur á telefonini ella teldlinum).
- Halt eyga við yvirskriftunum til hvønn kapittul. Hvat siga tær um innihaldið?
- Hugsa serliga um sambandið millum Aud og hinar persónarnar.

## Tá ið tit hava lisið

- Tosið um sólsmúkkuna. Hví hevur hon serligt virði fyri Aud?
- Lesið brotið um ættartræið á s. 10 og um eikitræið á s. 11. Hon sær seg sum eitt blómutyssi í einum vasa. Hvat merkir hetta?
- Nevnið nøkur evni ella viðurskifti, sum tit halda vera áhugaverd.

©Nám

## Evni at arbeiða við

Persónar og leiklutir. Setið orð á hesar persónar og teirra umhvørvi:

- Aud
- Vígdis
- Markus
- Mariann

- Vel ein persón úr bókini, tú kundi hugsað tær at arbeitt við. Tosið um trivnað og vinalag í flokkinum.
- Høvuðspersónurin verður happað. Hvat vita tit um talgilda happing? Er talgild happing øðrvísi enn beinleiðis happing?
- Nær og hvar sigur man frá? Hvussu kunnu tey vaksnu hjálpa, tá tey ikki vita, hvat gongur fyri seg?
- Kundi søgan um Aud farið fram á einum føroyskum skúla?
- Hevði søgan verið øðrvísi, um høvuðspersónurin var ein drongur?

## Aðrar uppgávur:

- Ger eina kreativa uppgávu um lýsingina av eikitrænum og blómutyssinum í vasanum (Tekstbrot á síðu 11).
- Skriva eina hugleiðing um, hvussu Aud fær sólsmúkkuna.
- Skriva ein nýggjan enda, har høvuðspersónurin fer til Bogota at leita eftir familjuni.
- Spegl/vindeyga:
  - Eru brot úr bókini, sum tú kennir teg aftur í?
  - Hvat sigur bókin um, hvussu tað er at vera ung/ur í eini familju, har tey vaksnu stríðast við eitt nú sálarsjúku, rúsdrekkamisnýtslu, sjúku o.s.fr?
- Hvussu nógv smileys gevur tú *Sólgráti*? (Frá 1-6).
- Frásjónargerð:
  - Rakel Helmsdal: *Hon, sum róði eftir ælaboganum*. Arbeiðstilfar liggur á snar.fo
  - Elin á Rógvi: *Flytifuglar*. Jólakalendarin er at finna á heimasíðuni VIT á kvf.fo

©Nám